**Ársfrágreiðing frá Sjúkrarøktaretiska ráðnum**

Nevndin setti sær fyri at arbeiða við fylgjandi:

Arbeiðsætlan fyri árið:

- framhaldandi at arbeiða við menning av førleikunum hjá limunum at greina og viðgera etiskar tvístøður
- at gera etiska ráðið meiri sjónligt millum limirnar í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
- at dagføra etisku leiðreglurnar, eins og samstarvið við felagið um viðgerð av lógum og reglugerðum, heldur fram.
- Fylgja við í kjakinum viðvíkjandi FarGen verkætlanini

**Menning av greinandi førleikum hjá limunum í ráðnum.**
Á regluligu fundunum hava limirnir greinað og viðgjørt etiskar tvístøður, sum limirnir sjálvir hava upplivað ella lisið í fakligum tíðarritum. Vit hava mangan sett okkum spurningin, hvussu tað ber til, at so gott sum eingin etisk tvíðstøða verður send ráðnum til viðgerðar. Hendan undran hevur ført til**,** at Sjúkrarøktaretiska ráðið fór undir eina kanning av, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar nýta yrkisetisku leiðreglurnar í praksis. [1] Kanningin er liðug og úrslitini verða løgd fram fyri limirnar í januar og februar 2015.

**Samstarv við norðurlond.**
Fakfeløgini í Svøriki, Norra, Danmark og Føroyum hava sjúkrarrøktaretisk ráð. Hesi hava síðan 2005 árliga fyrireikað og hildið ráðstevnur um sjúkrarøktaretikk, har londini skiftast um at vera fyriskiparar. Í ár var ráðstevnan í Norra, og har var skipað fyri fyrilestrum, uppleggi og orðaskifti í arbeiðsbólkum. Fyrilestrar vóru um "Det nasjonale etikkprosjektet 2008-2015", " Prioriteringer av omsorgsverdier- en glemt debatt?" "-Verdiena flyr ut av vinduet". Umframt hetta var gjøgnumgongd av reflektiónsmodellinum, ið nýtt verður í Norra.

Nevndin í Sjúkrarøktaretiska ráðnum í Føroyum metir, at tað er umráðandi og gevandi, at limir taka lut á norðurlendsku etisku ráðstevnunum. Samanumtikið kann sigast, at vit fáa vitan og innlit í arbeiðið í hinum ráðunum. Vit fáa arbeiðshættir at taka við okkum til okkara egna arbeiði, umframt hetta er tað eisini mennandi at vita, at vit sjálvi hava góð ískoyti til felags menning. Vanligt er, at tveir limir í ráðnum luttaka á Norðurlendsku etisku ráðstevnunum. Tað er serliga mennandi og gevandi fyri nevndina, tá ráðstevnan verður hildin í Føroyum, tí tá kann øll nevndin luttaka á ráðstevnuni.

**Gera sjúkrarøktaretiska ráðið meira sjónligt millum limirnar**
Tað verður mett sera umráðandi, at Sjúkrarøktaretiska ráðið er sjónligt millum limirnar í felagnum. Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur eina t-post adressu, ið er: etikkur@sjukrarokt.fo

[1] Sjá nærri frágreiðing í Vøku nr. 1 2012

Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur  lagt seg eftir at fáa prentað etiskar tvístøður í Vøku, ið ráðið hevur viðgjørt og greinað. Hetta er eitt lið í at gera ráðið sjónligt millum limir felagsins, og  at vísa á, hvussu limir felagsins kunnu brúka ráðið  og etisku leiðreglurnar. [2]

Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur fingið fyrispurning um hjartastartarar á røktarheimum í samband við bachelor verkætlan í sjúkrarøktarfrøði.  Tað er gleðiligt at lesandi brúkar ráði í teirra lesnað.

Arbeitt hevur verið víðari við at dagføra etisku leiðreglurnar. [3] Hesar skulu til viðgerðar á komandi aðalfundi. Tað er ógvuliga umráðandi, at limir felagsins kenna, at teir eiga part í orðingini av leiðreglunum og á tann hátt eisini eiga part í innihaldinum av teimum. Limir eru altíð vælkomnir at gera viðmerkingar/rættingar til leiðreglurnar, og Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur skyldu til at taka atlit at teimum.

Tað er bæði ynskiligt og aktuelt at gera viðmerkingar til lógaruppskot. Hetta er mangan trupult hjá ráðnum vegna væntandi arbeiðsorku.

**Framtíðarætlan**

Ætlanin er framhaldandi at fáa prentað upplivaðar ella lisnar etiskar tvístøður í Vøku, ið ráðið hevur viðgjørt og greinað.

Ætlanin er at fara undir at lýsa hugtøkini, ið eru í Etisku leiðreglunum og fáa tey prenta í Vøku  til tess at gera hugtøkini meira felags og skillig, og harvið stuðla nýtsluna av leiðreglunum , og at limir venda sær til ráðið.

Úrslitini av kanning, “ Eru sjúkrarøktarfrøðingar tilvitaðir um etisku leiðreglurnar í kliniskari praksis,”  verða løgd fram fyri limunum í januar og februar 2015. Katrin Andersen, sjrfr. ME-PE, Hildur við Høgadalsá, sjrfr. ME-PE og Annemi L. Joensen, sjrfr. M.S.sc. polit, hava gjørt kanningina.

Ætlanin er at taka fyrispurningin viðvíkjandi hjartastartara á røktarheimum upp í ráðnum til tess at lýsa tvístøðurnar,  ið sjúkrarøktarfrøðingar kunnu koma  í.  Ætlanin er síðani at fáa viðgerðina prentaða í Vøku til tess at lýsa tvístøðurnar, ið kunnu koma fyri.

Ætlanin er framhaldandi at fylgja við í kjakinum viðvíkjandi FarGen.

**Nevndarlimir til sjúkrarøktaretiska ráðið.**

Valskeiðið hjá limunum sær soleiðis út: Maiken Olsen, forkvinna, endurvald  2011 til 2015, og fer hon úr ráðnum. Katrin Andersen, skrivari,  2011 til 2015. Marjun Thomsen 2012 til 2016. Meta av Fløtum 2013-2017. Beinta D. Kollslíð 2014-2018. Viðtøkurnar fyri Sjúkrarøktaretiska ráðið vórðu broyttar í 2013 soleiðis, at veljast kundi tiltakslimur til ráðið. Birna M. Joensen varð vald sum tiltakslimur á seinasta aðalfundi.  Ráðið lýsir eftir nýggjum limi. Sí aðrastaðni í blaðnum.

---

[2] Sjá nærri í Vøku nr. 1 2012 og nr. 3 2012

[3] Sjá nærri í Vøku nr. 3 2014